Hjánám í

## Stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetrinum

Umsóknarfreist: 1. juli 2007

- Vilt tú uppstigast frá Bachelor til Master?
- Ert tú fluttur heim við ólidnari útbúgving?
- Vilt tú undirvísa í miðnámsskúlunum?
- Ella hevur tú bara áhuga í stjórnmálafrøði?

Á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya ber til at taka "Hjánám í Stjórnmálafrøði" frá heysthálvuni 2007. Hjánámið er vanliga partur av einum Masternámi á tilsamans 5 ár.

Hjánámið tekur 1½ til 2 ár og fevnir um skeið frá bachelor-útbúgvingini í Stjórnmálafrøði. Undirvísingin er felags við bachelor-undirvísingina í Stjórnmálafrøði á Søgu- og Samfelagsdeildini.

Lesandi við Bachelor-útbúgving frá øðrum hægri útbúgvingastovni kunnu vanliga uttan hóvasták fullfíggja sína útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya.

Nærri upplýsingar fáast á:

Søgu- og Samfelagsdeildini
J. C. Svabosgøtu 7, 100 Tórshavn
Telefon 35 25 80
Teldupostur: ssd@setur.fo
Heimasíða: **www.setur.fo/ssd**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

TEAM85

## Mentamálaráðið

KT-DEPILIN

## KT-RÁÐGEVI

**Starvið**
Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum, ágrýtnum og engasjeraðum KT-ráðgeva til KT-depilin. Starvið verður at seta 01. august 2007.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- umsita ambætarar
- umsita heimasíðu depilsins og stuðla skúlum við teirra heimasíðum
- skipa fyri skeiðum
- skipa samarbeiði millum skúlar
- menna talgilt undirvísingartilfar og talgildar undirvísingargongdir
- veita brúkaratænastu

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- útbúgving ella drúgvar royndir á telduøkinum
- hava royndir í undirvísingarverkinum
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt umframt at samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- eru tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Á økinum eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum KT-ráðgevin kemur at fáa ávirkan á. M.a. verður arbeitt við at seta í verk skúlafyrisitingarforritið VITANET. Frammanundan røkir KT-depilin brúkarasamskiftið í sambandi við Lønarforskipanarforritið.

Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnar fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella e-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 21. mai 2007, klokkan 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Regin Ellingsgaard, leiðara í KT-deplinum, telefon 321220 ella 555015. Regin hevur e-postin reginel@skulin.fo

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur ráðið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**KT-depilin** er staðsettur í Mentamálaráðnum og veitir sjálvstøðuga KT-tænastu í skúlaverkinum. KT-depilin er ráðgevandi hjá skúlaverkinum viðvíkjandi kunningartøkni og skipar fyri at eftirútbúgva lærarar í kunningartøkni. KT-depilin rekur samskiftisskipan skúlaverksins, sum nú hevur 13.970 brúkarar. Eisini veitir KT-depilin skúlum pláss til heimasíður teirra.

## DJÓRAHANDILIN søkir starvsfólk

**Tann, ið settur verður í starv, skal hava kunnleika og áhuga fyri djórum.**

**Vit vænta:**
- At tú ert mininum 17 ár.
- At tú ert vinarlig/ur, fyrikomandi og kann vegleiða og avgreiða viðskiftafólkum okkara, eftir upplæring.
- At tú ert samvitskufull/ur, møtir til tíðina og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

Reingerð av handli og vasking av akvarium og búrum er ein partur av arbeiðinum.

Arbeiðstímar: umleið 20 tímar um vikuna – seinni er møguleiki at fara upp í tíð.

Arbeiðstíð: 15.00 – 18.00 vikudagar og 10.00 – 14.00 leygardagar, umframt avloysing í feriunum.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 28.05.07

DJÓRAHANDILIN
AKVARIUBÚÐIN
POSTBOKS 3274 · FO - 110 TÓRSHAVN

## Alirøktarar

Søkt verður eftir 2 monnum til alingina hjá P/F Faroe Farming í Vági skjótast gjørligt.

Arbeitt verður eftir vaktarskipan.

Áhugaði ringið á tlf. 221447.

**P/F Faroe Farming**
**FO-900 Vágur**

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin í Føroya Heimavirkisfelag 2. juni kl. 14.00, í Tilhaldinum, Tórsgøta 21, Tórshavn. Skrá sambært viðtøkum felagsins.

***Nevndin***



## Opel Combo til sølu

Ein sera vælhildin Opel Combo 1.6 persónbilur til sølu. Bilurin er frá juni 2003 og hevur koyrt 53.000 km. Er økonomiskur, rúmligur og sera vælegnaður sum familjubilur. Hevur skjótihurðar í báðum síðum.

**Útgerð:** Nýggjar 17" alu-felgur/dekk, fjarstýrt sentrallás, el-rútar framman, tokulyktir, radio við fløguspælara, v.m.

**Prísuppskot: 118.000,-**

**Tel 21 19 96**